VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men lítið ella einki avfall. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið Ólavsøkuaftan:
Gul til stívt andøvsgul av norði og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

Veðrið Ólavsøkudag og mánadagin:
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 8 og 12 stig.

Vit nøkta ein tørv

- Fólk her á leiðum eru glað fyri at fáa ein stóran matvøruhandil í grannalagnum, sigur Dánjal Jespersen, leiðari í Mylnuni, sum læt deild upp í Jónas Broncksgøtu í morgun

HANDIL
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Bakaríið Mylnan breiðir seg alsamt. Síðani SMS yvirtók bakaríið hevur Mylnan latið upp deild á Smyrilsvegi – fyri tveimum árum síðani – og í morgun læt enn ein deild hjá fyritøkuni upp, hesaferð í Jónas Broncksgøtu.

- Væl av fólki hevur verið inni á gólvinum í morgun, og vit hava bara hoyrt gott um, at vit nú lata handil upp her. Fólk herum vegir eru ógvuliga glað fyri, at fáa ein stóran matvøruhandil í grannalagnnum, sigur Dánjal Jespersen, leiðari í Mylnuni.

Síðani ein deild av Mylnuni læt upp á Smyrilsvegi fyri tveimum árum síðani, hava tey merkt ein alsamt vaksandi tørv á slíkum bakaríútsølum/matvøruhandlum. Við hesum handlinum í Jónas Broncksgøtu er tørvurin so nøktaður fyri eysturbýin. Hvussu verður í vesturbýnum er kortini eingin støða tikin til enn.

- Tað kundi verið ynskiligt og logiskt at hugsa tann vegin, men fyribils fara vit so at síggja tíðina ann og vita, hvussu tað fer at hilnast við handlinum her, sigur Dánjal Jespersen.

Mylnan í Jónas Broncksgøtu er bygd upp eftir sama konsepti sum á Smyrilsvegi, og upplatingartíðirnar verða tær somu, frá sjey á morgni til ellivu á kvøldi hvønn dag í vikuni. Talan er bert um heilt fáar dagar í árinum, at handilin ikki er opin.

Tað vísir seg, at kundin vil hava møguleika at handla størri part av døgninum, og tað ynski mugu vit royna at eftirlíka. Tað er stutt sagt neyðugt at fylgja við tíðini, sigur Dánjal Jespersen.

Enn verður alt hjá Mylnuni bakað í bakarínum uppi í Berjabrekku. Tá vit spyrja, um umstøðurnar har eru nøktandi sigur Dánjal Jespersen, at tað byrjar at gerast heldur trongligt. Men hann vil kortini ikki gera viðmerkingar til, um teir umhugsa eitt størri bakarí, kanska í vesturbýnum.

Mynlan hevur nú útsølustað í Berjabrekku, á Smyrilsvegi og í Jónas Broncksgøtu.

Mylnan læt útsølustað upp í Jónas Broncksgøtu í morgun
Mynd: Jens Kristian Vang

Fýra ára gamli Jón Martin Midjord var til handils í nýggju hølunum við ommu síni í morgun
Mynd: Jens Kristian Vang

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	9
Nuuk	12
Qaqortoq	9
Ammassalik	8
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	15
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	11
Lerwick	14
Aberdeen	12
London	18
Tromsø	--
Bergen	17
Oslo	--
Stokkhólm	22
Keypmannah.	16
Helsinki	21
Moskva	21
Berlin	17
Warzawa	28
Kiev	23
Bukarest	35
Paris	19
Madrid	27
Róm	28
Malorca	30
Athen	37
Malta	36
Tunis	35
Beijing	31
New Dehli	32
Bangkok	28
Jakarta	32
Sydney	16
New York	27
Miami	30
Los Angeles	22
Meksikobýur	21
Panama	27
La Paz	11
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	7

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt lágtrýst, 988 hPa. vestan fyri Írland fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.

Í dag:
Lágtrýstið við Írland fer eystureftir og brúgvalagið við Føroyar fer spakuliga suðureftir.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 22/7 kl. 06^{00} – 23/7. 06^{00}. Hitin í gjár: 12,0°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/7 kl. 06^{00}– 2/7 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í juli: 28,0 mm

Ólavsøkan 2007

Fríggjadagur 27. juli
kl. 15-20 framsýning við skemtitekningum hjá Óla P

kl. 15-20 filmsfyrivísan torvfilmurin "Burtur á Heiði" og BBC filmur frá 1966 "Islands in the Clouds" verða vístir.

kl. 15-17 bókaframløga "Føroya Mál á manna munni – móðurmálið og málrøkt" eftir André Niclasen.

Spælimenninir spæla í Miðlagarðinum

Leygardagur 28. juli
kl. 14-20 framsýning við skemtitekningum hjá Óla P

filmsfyrivísan torvfilmurin "Burtur á Heiði" og BBC filmur frá 1966 "Islands in the Clouds" verða vístir.

kl. 18 spælir og undirheldur Eid Spelemannslag

konsert við Elin Heinesen.

Sunnudagur 29. juli
kl. 14-20 framsýning við skemtitekningum hjá Óla P

filmsfyrivísan torvfilmurin "Burtur á Heiði" og BBC filmur frá 1966 "Islands in the Clouds" verða vístir.

kl. 14 spælir og undirheldur Eid Spelemannslag

kl. 16 framløgukonsert við Høgna Reistrup

kl. 22.15-23 konsert við Sigrid Rasmussen

VESTFALLSKYRRINDI

22. juli	Fyrra kvarter
	Mánin longst frá jørðini
30. juli	Fullmáni
4. august	Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
24. Juli	03.03	15.25	02.03	14.25	02.18	14.40	05.03	17.25	06.03	18.25	01.18	13.40	00.18	12.40	03.18	15.40	04.18	16.40	02.48	15.10	04.03	16.25
25. Juli	03.48	16.11	02.48	15.11	03.03	15.26	05.48	18.11	06.48	19.11	02.03	14.26	01.03	13.26	04.03	16.26	05.03	17.26	03.33	15.56	04.48	17.11
26. Juli	04.35	16.59	03.35	15.59	03.50	16.14	06.35	18.59	07.35	19.59	02.50	15.14	01.50	14.14	04.50	17.14	05.50	18.14	04.20	16.44	05.35	17.59
27. Juli	05.24	17.49	04.24	16.49	04.39	17.04	07.24	19.49	08.24	20.49	03.39	16.04	02.39	15.04	05.39	18.04	06.39	19.04	05.09	17.34	06.24	18.49
28. Juli	06.14	18.36	05.14	17.36	05.29	17.51	08.14	20.36	09.14	21.36	04.29	16.51	03.29	15.51	06.29	18.51	07.29	19.51	05.59	18.21	07.14	19.36